## Til læknan við matpakka

Grønlendska heilsuverkinum vantar fleiri sjúkrasystrar, men har er eisini trot á læknum. KNR sigur, at skalt tú til læknan í Nuuk, mást tú brynja teg við góðum toli, og tað kann vera eitt gott hugskot at hava matpakka við, tí tað kann taka drúgva tíð at fáa orð á læknan. Kanska ein heilan dag. Jesper Olsen, leiðandi økislækni, sigur við KNR, at tørvur er á fleiri læknum, men at tað hevur víst seg at vera sera torført at fáa nakrar at søkja leys størv.




*Tað kann taka allan dagin at bíða eftir læknanum í Nuuk*
*Mynd: KNR*

## Fleiri fáa HIV

Nýggjar kanningar í USA vísa, at har eru fleiri nýggir tilburðir av HIV, enn higartil hevur verið hildið. Granskararnir siga, at higartil hevur verið mett, at 40.000 nýggir tilburðir eru í USA um árið, men tað vísir seg nú, at tað rætta talið er umleið 50.000. Amerikanski fyribyrgingarstovnurin CDC sigur, at umleið 1,1 millión amerikanarar hava HIV-smittuna í sær, men at 25 prosent av teimum vita als ikki, at tey eru smittað.

# Niðurstøðan undarlig

**Tað er løgið, at somu menn, sum fyri fáum árum síðani koyrdu Jørgen Niclasen frá sum landsstýrismann, tí hann skuldi havt komið landsins ognum í váða, nú als eingi krøv seta, tá veðhaldið í Napoléon skal flytast til annað skip, segði Jacob Vestergaard við Rás2 í gjár**

VEÐHALD
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonb@sosialurin.fo*



*Jacob Vestergaard, løgtingsmaður hjá Fólkaflokkinum, undrast á niðurstøðuna hjá trímannabólkinum*

Lógin um stuðul til fjarfiskiflotan var upprunaliga sett í verk fyri at bjarga trimum rækjuskipum fyrst í øldini. Hetta var gjørt við at veðhald í skipunum hjá landinum vóru løgd um til rentu- og avgjaldsfrí lán, sum eftir vórðu niðurskrivað yvir ávíst áramál, og fellur burtur í 2012.

Vórðu skipini seld áðrenn hetta tíðarskeið er runnið, fellur fulla upphæddin til gjaldingar. Tó kundi reiðarí søkja um at veðhaldið verð flutt yvir á annað skip, men tá fylgdu ávísar treytir við.

Kongshavnar Útgerðarfelag hevur søkt um at fáa veðhaldið, sum var í Napoléon yvir á annað skip, men hóast skipið er selt á tvingsulssølu, og hóast reiðaríið einki annað skip hevur, mælir sonevnda trímannanevndin til, at veðhaldið verður flutt yvir á eitt annað skip. Einasta treyt er, at Kongshavnar Útgerðarfelag útvegar annað skip innan eitt hálvt ár. Og tað er Jacob Vestergaard firtin um.

- Lógin sigur heilt greitt, at tá skipið verður selt, fellur veðhaldið til gjaldingar. Og skal tú gera nakað eftir §5.2, so skuldi tú søkt um tað, áðrenn skipið varð handlað, heilt greitt, segði Jacob Vestergaard.

Hann heldur, at fylgir landsstýrið tilmælinum hjá trímannabólkinum, so misrøkir landsstýrið pengarnar hjá tí almenna.

- Tað er heilt greitt, tí tað verða eingi krøv sett til hvat skip kann koma inn í flotan og yvirtaka veðhaldið frá Napoléon yvirhøvur. Løgtingið hevur annars sæð ógvuliga álvarsliga upp á hetta við veðhaldum – serliga teir, sum í dag sita í landsins stjórn, bæði landsstýrismaðurin í fiski- og tilfeingismálum, sum nú er partur av málinum, Høgni Hoydal og løgmaður, ið tá kravdu táverandi fiskimálaráðharra, Jørgen Niclasen frá, tí hann skuldi havt misrøkt somu løggávu um veðhald – so nú roynir man at tileinkisgera og flyta runt við veðhaldum, segði Jacob Vestergaard.

### Fara eftir pengunum

Hann sigur, at landsstýrið fyri langari tíð síðani átti at havt tryggjað landinum pengarnar, og at tað átti at verið gjørt longu undir undanfarna landsstýri. Hinvegin heldur hann einki forgjørt vera í, at trímannabólkurin viðger umsóknina.

- Men eg haldi bara, at niðurstøðan er rættiliga undarlig og ikki í tráð við tað, sum vit fyrr hava sæð í hesum málinum. Tað varð jú gjørd ein serfrøðingakanning, tá Jørgen Niclasen varð kravdur frá, og í henni eru fleiri áhugaverdar niðurstøður, so veðhaldini eru viðgjørd væl og grundiga. Og tí haldi eg, at niðurstøðan hjá trímannabólkinum er rættiliga undarlig, segði Jacob Vestergaard.

Hann heldur kortini ikki, at tað var nakað skeivt í, at trímannabólkurin viðgerð málið, tí hann varð jú í sínari tíð settur til júst tað sama.

- Men tað tók for langa tíð at fáa málið sent til trímannabólkin, og trímannabólkurin tók for langa tíð um at viðgera málið, segði Jacob Vestergaard.

Hann heldur, at tað framvegis ber til at tryggja landskassanum í hvussu er ein part av pengunum.

- Tað ber enn saktans til, tí sumn eg skilji tað, eru ávísar ognir enn í felagnum, so tað skuldi borið til at tryggja ein part av pengunum, segði Jacob Vestergaard.

Hannheldur, at landsstýrið eigur at fara aktivt inn og tryggja landskassanum tann pening, sum tað ber til at fáa fatur á.

- Tá skipið er selt er veðhaldið fallið til gjaldingar, og tí eigur landsstýrið at fara eftir teimum pengunum, sum tað er møguligt at fáa inn, segði Jacob Vestergaard við Rás2.

# Niðurstøðan hjá trímannabólkinum

**Vit endurgeva her nøkur brot úr niðurstøðuni hjá trímannabólkinum:**

**§5. Stk. 2** Landsstýrið kann eftir umsókn loyva eigara, at um fiskifarið verður selt, kann niðurskrivingin sambært §§2-4 av restskuldini halda fram í fiskifari, ið verður útvegað innan 1 ár eftir søludagin. Verður nýggja fiskifarið selt, áðrenn øll skuldin er niðurskrivað, fellur eisini tann parturin, sum er niðurskrivaður í gamla fiskifarinum, til gjaldingar.

Nevndin kann staðfesta, at veðbrævið hjá landskassanum liggur uttanfyri virðið á m/tr »Napoléon«, og veðrættarstøðan tí ikki kann gerast verri við at verða flutt yvir á annað skip.

### Niðurstøða

Støðutakanin hjá nevndini til umsóknina er framhaldandi, at hon í princippinum kann tilmæla, at lánið verður flutt yvir á annað skip, soleiðis sum tað verður søkt um. Nevndin kann tí mæla landsstýrinum at ganga umsóknini á møti, treytað av at landsstýrið innan eina hóskandi freist fær hóskandi veð í annað skip fyri upprunaligu upphæddina. Núverandi veðrættur hjá landskassanum lá uttanfyri skipavirðið á »Napoléon«, og tí kann nevndin tilmæla, at nýggja veðbrævið eisini liggur uttanfyri skipavirðið á næsta skipinum.

Viðmerkjast skal, at lógin ásetur, at nýggja skipið skal verða útvegað innan 1 ár eftir, at fyrra skipið er selt. Hendan freist er langt síðani farin, uttan tó at umsøkjarin hevur skylduna av hesum. Umsóknin er komin inn uml. 6 mánaðir eftir søluna. Mett verður tí, at ein hóskandi freist at seta umsøkjaranum at útvega annað skip er 6 mánaðir.

Nevnast kann, at tey, sum manna trímannabólkin, eru Annfinn V. Hansen, Julianna Klett og Sjúrður Horsdal.